# Samráðast um at bjarga sjúkuraktum alibrúkum í arbeiðssteðgi

**– Ein avtala er næstan í pottinum um at bjarga sjúkuraktum alibrúkum í einum møguligum arbeiðssteðgi í næstu viku**



*Nevndin í Føroya Arbeiðarafelag er tann sama eftir aðalfundin hósdagin. Frá vinstru sita Agnar Olsen, Margretha Rasmussen, Karla Einarsson, Sunrid Vang, Páll Nielsen, sakførari felagsins, Georg F. Hansen, næstformaður og á talarastólinum, Ingeborg Vinther.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

ARBEIÐI Í VERKFALLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið verkfall var seinast, varð nógv sagt og skrivað um, hvussu hetta ávirkaði tey alibrúk, sum vórðu fongd við ILA.

Arbeiðsgevarar søgdu, at verkfallið var ein vanlukka fyri alivinnuna, tí arbeiðarafeløgini vildu ikki geva undantaksloyvi, so at teir sluppu at røkta tey sjúkuraktu alibrúkini og at taka tann deyða fiskin.

Arbeiðarafeløgini varaðu skjótt aftur, at tey høvdu verið vælviljað, men at arbeiðsgevarar misnýttu støðuna til eisini at gera annað arbeiðið enn tað, sum hevði við sjúku at gera.

Síðani hevur nógv verið tosað um at fáa eina avtalu ímillum Arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg soleiðis at undantak kann fáast til at røkta sjúkurakt alibrúk og so at sjúkur fiskur kann takast, skuldi arbeiðssteðgur verðið.

## Avtala undir landi

Og tað tykist sum um at báðir partar hava tikið støðuna í stórum álvara og hava roynt at fáa skipað viðurskifti á hesum øki, tí nú er ein avtala ímillum arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg um tey sjúkuraktu alibrúkini í sambandi við arbeiðssteðg, við at koma undir land.

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag hósdagin, upplýsti Ingeborg Vinther, forkvinna, fyri fundarfólkinum, at ein semja um tey sjúkuraktu alibrúkini var heilt undir landi.

Ingeborg Vinther kundi ikki siga so nógv um avtaluna, tí semjan var ikki heilt greið enn, men hon segði, at semjan bygdi ikki á, at arbeiðarafeløgini á nakran hátt skuldi frásiga sær verkfalsrættin.

– Men tað er semja um at fáa skipa viðurskifti á økinum, so at undantaksloyvi kann gevast til at fóðra og annars røkta sjúkurakt alibrúk fyri at forða fyri at stór virði fara fyri skeyti, sigur hon.

Hon sigur, at talan er um eina tvey ára avtalu um tey sjúkuraktu alibrúkini.

Í stuttum ber avtalan í sær, at undantaksloyvi verður givið í hvørjum einstøkum føri og hvørja ferð skal sjúkuváttan fáast til vega frá djóralæknanum.

Nær avtalan verðuur klár at skriva undir, var ikki greitt hósdagin, men Ingeborg Vinther segði, hon var nær við.

---

# Tey lágløntu offraði í politiskum rossahandli

**– Kanska var tað skattalættin, sum kostaði javnaðarflokkinum fólkatingsmannin, sigur Ingeborg Vinther**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Skattalættin,sum samgongan hevur framt, er ein rossahandil, sum rakar tey lágløntu meint.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðing síni á aðalfundinum í felagnum hósdagin.

Ikki óvæntað fingu politikararnir nøkur orð við sær á vegnum í formansfrágreiðingini.

Tá ið skattalættin varð latin, vóru lág- og miðalinntøkurnar við sviðusoð, tað festi Ingeborg Vinther.

Hon vísti á, at Arbeiðarafeløgini høvdu gjørt eitt uppskot, ið gav lág- og miðalinntøkunum skattalætta, meðan háinntøkurnar heldur komu at gjalda meiri skatt.

– Hetta løgdu vit fíggjarnevndina hjá løgtinginum, men tað fekk kalda móttøku og varð ikki tikið til eftirtektar,sigur Ingeborg Vinther.

Hon heldur ikki, at tíðin er til at lata skattalætta, nú hall er á fíggjarlógini.

– Men skuldi skattalætti gevast, so var tað ikki háinntøkurnar, sum skuldi fáa hann, men til láginntøkubólkarnar.

– Vit kenna øll til politiskar rossahandlar, og tað varð gjørt í hesum máli.

Hon sigur, at javnaðarflokkurin gjørdi ein rossahandil fyri at fáa samgonguna at gangavið til at hækka inngjaldið til samhaldsfasta eftirlønar-grunnin. Aftur fyri at bøtt um samhaldsfasta, gekk flokkurin við til at lata teimum háinntøku skattalætta.

– Hetta var ein rossahandil og teir raka aloftast vanliga fólkið. Vit kunnu kanska siga, at hetta kostaði javnaðarflokkinum fólkatingsmannin á fólkatingsvalinum. Møguliga hava teir lært nakað av hesum, sigur Ingeborg Vinther.

Men tað eru eisini onnur dømi um, tað at samgongan arbeiðir til frama fyri háinntøkurnar.

Hon sipar til lógina um skuldareftirgeving til tey, ið skylda landskassanum milliónir, – Nógv av skuldini stavar frá, at tey settu pening í veð sum skattaspekulatión. Onnur skylda milliónir í mvg, sum tey ongantíð hava goldið.



*Á aðalfundinum hósdagin fingu limirnir í Føroya Arbeiðarafelag at vita, at arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarar eru um heilt tætt við at gera eina søguliga avtalu. Norðurlendsk fløgg eru á borðinum, tí í sambandi við 25 ára starvsdag hjá forkvinnuni, eru gestir úr fleiri Norðurlondum komnir til Føroya*

*Mynd: Finnur Justinussen*

– Ótrúligt, at nakar við politiskari ábyrgd kann vera við til at gera tílíkt lógligt. Skyldar ein vanligur løntakari 200–500.000 krónur og søkir um at fáa skuldina strikaða, fær hann at vita, at hann skyldar ov lítið og noyðist at gjalda skuldina.

– Men tann, sum skyldar milliónir, skal sleppa undan skuldini og tað skilji eg ikki.